# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Uttanríkis- og vinnumálaráðið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 08/06-2018 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | ÁTD/GL |

**(Uppskot til)**

**Kunngerð**
**um**
**sigling við ferðamannaskipum, ið sjóseta smærri bátar við ferðafólkum**

Við heimild í § 31 og § 49, stk. 2 í løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum, sum broytt við løgtingslóg nr. 61 frá 17. mai 2013, verður ásett:

**§ 1.** Kunngerðin er galdandi fyri sigling við ferðamannaskipum, ið eru 100 bruttotons til støddar ella meiri, í innara sjóøkinum.

**§ 2**. Smærri bátar, ið verða sjósettir av ferðamannaskipum, sbrt. § 1, skulu altíð koma til eina ISPS-góðkenda havn, ið avvarðandi havnamyndugleiki hevur ávíst.
*Stk. 2.* Sigling í innara sjóøkinum við smærri bátum, sum ikki hevur til endamáls at flyta ferðafólk inn ella úr eini ISPS-góðkendari havn, er bannað.

**§ 3.** Brot á § 2 verður revsað við bót.
*Stk. 2.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting.

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen